Byrjað er upp á útgrrevsturin fyri nýggja bygninginum hjá Havnar Timburhandli á Kambsdali.
Mynd: Jens Kristian Vang

Nýggjur timburhandil á Kambsdali

Havnar Timburhandil fer at byggja nýggjan bygning á Kambsdali. Tað var vorðið ov trongligt og óarbeiðsligt í gamla handlinum

BYGGIVINNA
Edvard Joensen

Kambsdali: Plássið er ov lítið í timburhandlinum á Kambsdali. Tí hevur leiðslan í Havnar Timburhandli, sum eigur handilin á Kambsdali, gjørt av at byggja nýgjan bygning til timburhandilin.

Havnar Timburhandil hevur havt deild á Kambsdali síðan 1994, sigur Heini Fossaa, stjóri í Havnar Timburhandli. Handilin hevur hildið til í einum gomlum snikkaraverkstaði. Men har er ov óarbeiðsligt til at reka timburhandil, sigur stjórin. Tað er ov trongt og ov lágt, sigur hann.

Heini Fossaa letur at, at tað hevur bara gingið uppeftir, síðan latið varð upp á Kambsdali, og hann metir avgjørt tørv vera á eini deild í økinum. Virksemið er avgjørt til tað, heldur hann.

Fuglafjarðar Kommuna hevur gjørt eina heildarætlan fyri Kambsdal, og har er millum annað lagt øki av tilídnaðarendamál. Timburhandilin hevur hesi árini ligið uttan fyri tað økið. Men nú, bygt verður av nýggjum, verður bygt inni á ídnaðarøkinum, soleiðis at tað fer at passa inn í ætlanina hjá kommununi, sigur Heini Fossaa. Fuglafjarðar Kommuna hevur keypt bygningin, har timburhandilin heldur til í løtuni.

Nýggi bygningurin, sum Havnar Timburhandil fer at byggja á Kambsdali, verður 1.600 fermetrar til víddar, sigur stjórin. Hann verður bygdur bæði til byggibúðina, sum selur amboð og annað, sum horyir byggivinnuni til, eins og sjálvandi eisini stór goysmluhøll verður uppií. Bygningurin skal hýsa allari goymslu undir taki, sigur Heini Fossaa.

Hann veit enn ikki neyvt at siga, hvussu nógv byggingin fer at kosta. Higartil er bara grivið út, og gjørt arbeiðið boðið út enn. Tað fyriliggur bara ein fyribils tekning, sigur Heini Fossaa, stjóri í Havnar Timburhandli.

Umframt høvuðssætið á Hálsi í Havn og deildina á Kambsdali, hevur Havnar Timburhgandil eisini eina deild heima á Sandi.

Bøta um línuspælið

Sørvingar royna eina betran av línuspælinum hjá Oilwind, sum greiðir húkarnar á stokk, so hvørt drigið verður

TØKNI
Edvard Joensen

Línuspælið líkist einki frá tí vanliga, tá ein sær tað.....

.....men húkurin fer beinleiðis niður á stokkin, og eingin snúður er í teyminum, tá egnast skal aftur

Sørvági: Við einum nýggjum »splittara« í spælinum, verður tað gjørt nógv lættari at egna stampin aftur, tá hann kemur á borðið.

So einfalt er úrslitið higartil teimum royndum, Bjarni Joensen í Miðvági ger við gamla, kenda línuspælinum frá Oilwind.

Brøðurnir Helgi og Jákup Heri Leonson rógva út úr Sørvági við glastrevjabátinum Álitið, sum smiðjumenninir í Miðvági eiga. Samstundis royna teir eisini eitt nú nýggju ábøturnar á línuspælið, sum Bjarni Joensen arbeiðir við.

– Hetta riggar bara heilt væl, letur Helgi Leonson at. Bjarni hevur gjørt ein nýggjan »splittara«, sum fangar húkin og stýrir honum beinleiðis niður á ein stokk, sum settur verður í sjálvan stampin. Stampurin verður síðan festur undir spælið, soleiðis at samband er við traktina, sum húkurin kemur ígjøgnum. Soleiðis fer húkurin beinleiðis niður á stokkin, meðan línan sjálv verður kveilað niður í stampin.

Úrslitið hevur higartil verið gott, sigur Helgi Leonson. Eingin snúður er á teymunum, tá liðugt er at draga, og tað hava egnarannir funnið útav. Og tað ger so aftur, at tað ikki stendur á hjá teimum at fáa egnarar í Sørvági.

– Smádreingirnir eru púra villir eftir at sleppa at egna hjá okkum, heldur hann fyri.

Lítið barnavinarlig barsilskipan

Tá Jane og Allan av Eiði fingu dóttrina Emiliu løgdu tey ætlanir eftir tí, sum tey fingu úr barsilsskipanini. Men tá løgtingið broytti skipanina á nýggjárinum, fingu tey brádliga 5.000 krónur skryktar úr húsarhaldskassanum. Nú noyðist mamman kanska aftur á flakavirki, pápin til skips og dóttirin í pleygu, hóast hon bert er fýra mánaðir enn

BARSILSBROYTING
Ingi Rasmussen

Tey hugna sær við dóttrini Emiliu. Men Jane og Allan er eisini ill inn á, at myndugleikarnir brádliga kunnu broyta fortreytirnar fyri barslinum, sum tey eru í
Mynd: Jens Kristian Vang

Órímiligt. Tað er orðið.

Unga mamman á Eiði líkasum leitar eftir orðinum fyri, hvussu órættvíst tað er, sum henni hevur verið fyri.

21 ára gamla Jane Larsen, fýra mánaðar gamla dóttirin Emilia Jónhild Eidesgaard Poulsen og maðurin Allan Eidesgaard Poulsen eru komin í klemmu í barsilsskipanini, sum varð broytt á nýggjárinum.

Útrokningargrundarlagið fyri barsilspengunum er farið frá at vera teir bestu seks samanhangandi mánaðirnir seinasta árið, til at vera miðalinntøkan 12 teir síðstu mánaðirnir undan barsilsfarloyvinum. Lógin varð broytt við gildi frá nýggjárinum við vælsignilsi frá løgtinginum.

5.000 krónur minni

Fyrstu tríggir mánaðirnir av barsilsfarloyvinum hjá Jane Larsen vóru brúktir í 2002, og teir næstu tríggir skuldu brúkast í 2003. Og har ímillum er ein himmalvíður munur.

Við eitt fær hon slakar 5.000 krónur minni í barsilsgjaldi um mánaðin, tí skipanin varð broytt frá nýggjárinum. Heilt neyvt er hennara inntøka farin úr 13.566,18 kr. um mánaðin niður í 8.817,70 kr. Eitt minus í húsarhaldinum upp á 4.748,48 kr. eftir einum degi.

Tað gongur út yvir lítlu Emiliu Jónhild Eidesgaard, sum kanska noyðist í pleygu, hóast hon bara er fýra mánaðir gomul. Hon er sostatt eitt offur fyri, at meirilutin av okkara fólkavaldu hildu, at barsilsskipanin var ov dýr, og at summi tískil skuldu fáa minni útgoldið í barsilstíðini. Tað blivu tey við tí óstøðugu inntøkuni. Fólk sum Jane, ið arbeiðir á flakavirki.

Afturvirkandi

Vit skrúva tíðina nakað aftur. Jane Larsen, sum er donsk, og Allan Eidesgaard Poulsen, sum er ættaður av Eiði, búgva saman uttan fyri Aalborg. Í 2000 gera tey av at flyta til Føroya. Í fyrstu atlogu vilja tey royna at búgva í landinum eina tíð, men longu eftir einum hálvum ári eru tey fallin so væl til á Eiði, at tey velja at keypa eini gomul hús, sum tey seta í stand.

Hann siglir úti, og hon arbeiðir á fiskavirkinum FARITA í Haldórsvík. Tað gongst heldur striltið hjá Jane at gerast við barn. Hon hevur mist tvey børn undir belti, so tá hon varnast, at hon aftur er við barn, ger læknin av at sjúkramelda hana frá mars 2002.

18. oktober eigur hon dóttrina, og hon gleðir seg at ganga heima.

Tey hava roknað tað út. Um hon fær tær 13.000 krónurnar um mánaðin frá barsilsskipanini, soleiðis sum lógin leggur upp til, so hongur tað saman. Allan kann eisini vera heima fyrstu mánaðirnar, og tey klára kortini at gjalda hvørjum sítt.

Men so fer løgtingið at viðgera barsilsskipanina av nýggjum. Ein dagin fer Jane í bankan at taka pengar út, tí nakrar rokningar skulu gjaldast. Men í bankanum siga tey, at onki er komið inn á kontuna. Hon undrast og ringir til Barsilsskipanina. Har greiða tey frá, at hennara útgjald skal roknast umaftur, tí broytingar eru samtyktar á løgtingi.

Pengarnir koma í bankan, men nú eru teir nógv færri. Síðan kemur brævið frá Barsilsskipanini við kunningini. Útrokningargrundarlagið er broytt, siga tey, so at útgjaldið hjá teimum flestu verður lækkað frá 1. januar 2003. Brævið, sum er dagfest í februar, endar við orðunum, at »hetta er eisini galdandi fyri tey, sum fóru í barsilsfarloyvi áðrenn 1. januar 2003«.

Lítið barnavinarligt

Jane og Allan fáa sum frammaná, nú tey so knappliga eru vorðin fátækari.

– Hetta er órímiligt. Høvdu vit vita í góðari tíð, hvørjum vit kundu rokna við, so kundu vit lagt ætlanir eftir tí. Vit hava fingið sett lánsgjøldini niður í eina tíð, so vit kunnu klára okkum við tí, sum eg fekk. Men at fáa skrykt 5000 krónur burtur av mánaðarligu inntøkuni eftir einum degi, tað er meira enn okkara økonomi klárar, sigur Jane.

Nógv er at gjalda, sigur hon. Blæur, matur, streymur og rokningar hjá einari familju við pinkubarni er dýrt. Tað hjálpir lítið við teimum 5.000 krónunum, som eftir eru, tá skatturin er goldin.

– Um eg ikki fái hjálp frá Almannastovuni, so noyðist eg aftur til arbeiðis, og tað haldi eg vera ov galið. Landið kann ikki bara knappliga broyta fortreytirnar hjá fólkum við afturvirkandi kraft, sigur Jane.

Nú noyðist Allan aftur til skips sum skjótast. Tað hjálpir heldur onki beinanvegin, tí tann lønin kemur ikki til høldar, fyrr enn túrurin er av. Avleiðingin av øllum kann tískil gerast, at Jane má til arbeiðis aftur á fiskavirkinum, meðan fýra mánaðar gamla dóttirin verður sett í pleygu.

– Tað er ikki serliga barnavinarligt, og um onnur verða viðfarin á sama hátt, so kann tað forskrekkja fólkum frá at fáa fleiri børn, sigur Jane, sum hevur hoyrt um fleiri, ið eru í líknandi støðu sum tey.

Fara ongan veg

Niðrifrá kenna tey bæði til tað sosiala trygdarnetið, sum verður spent undir familjur við børnum, og tey eru vitandi um, at høvdu tey verið niðri nú, so vóru tey í eini heilt aðrar støðu.

Men tey vilja ikki aftur til Danmarkar, hóast tey kenna seg illa viðfarin av føroysku skipanini beint nú.

– Vit vilja gjarna búgva í Føroyum. Í Danmark er lætt at fáa hjálp, men har er nógvur kriminalitetur. Her er ongin kriminalitetur, men heldur ongin serlig hjálp, sigur Jane við einum smili.

Fakta

Við løgtingslóg nr. 110 frá 20. desember 2002 broytti løgtingið útrokningargrundarlagið fyri barsilspengunum.

Fyrr var mánaðarliga barsilsútgjaldið roknað við støði í annaðhvørt inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar frammanundan barsilsfarloyvinum, ella einum samanhangandi 6 mánaða skeiði, um hetta var hægri.

Nú verður útgjaldið einans roknað við støði í inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar frammanundan barsilsfarloyvinum. Hetta hevur við sær í flestu førum, at útgjaldið lækkaði frá 1. januar 2003. Tað er eisini galdandi fyri tey, sum fóru í barsilsfarloyvi áðrenn 1. januar 2003.

Álitið hevur fingið mein

Tað er gott at vera í Føroyum. Jane og Allan stórtrívast við dóttrini Emiliu og hundinum Smut á Eiði, har tey hava búð síðstu tvey árini.

Og tey hava ongar ætlanir um at flyta aftur til Danmarkar.

– Vit eru glað fyri at vera her, og okkum dámar serliga væl friðin. Landið og fólkið er barnavinarligt. Tað sama kunnu vit ikki siga um politikararnar, sum uttan nakað kunnu finna upp á at broyta lógirnar og tilverugrundarlagið hjá barnafamiljum, sigur Allan, sum undrast stórliga á, at barsilsútgjaldið hjá konuni eftir einum mánað er minkað við 5000 krónum.

Hansara álit á politikarar hevur altið verið so sum so. Og tað verður ikki betri av hesum, sum tey nú hava verið fyri.

– Hetta vísir bara, at politikarar ikki vita, hvat rørir seg millum fólk. Eg eri vísur í, at fólk vilja gjalda til eina góða barsilsskipan, tí fólk flest halda tað vera best, at barnið er heima hjá mammuni og kanska eisini pápanum fyrstu tíðina, sigur Allan.

Nú fer hann aftur til skips við Fuglfirðingi. Tað hevur hann onki ímóti, men hann kundi bara hugsað sær, at hann fekk at vita í góðari tíð, hvørjum hann kundi rokna við.